# Nú hava vit alt, sum vit ynsktu okkum við hinum skipinum

**Tað er trongt á verksmiðjuni umborð á Atlantic Navigator, men framleiðsluorkan er í staðin rættiliga stór, nú 16 skerimaskinur kunnu mala í senn, og eingin fløskuhálsur skuldi verið á verksmiðjuni og í arbeiðsgongdini annars**

ATLANTIC NAVIGATOR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Nú hava vit alt, sum vit hava gramt okkum um, at vit ikki høvdu umborð á Nærabergi.

Soleiðis málber Brandur Nólsoy, skipari, seg, tá ið vit spyrja hann um útliti fyri betri lønandi rakstri.

Í greinini á blaðsíðu 18 og 19 vísir hann á, at framleiðsluorkan umborð á Atlantic Navigator í allar mátar er størri, enn hon var umborð á Nærabergi.

## 700 tons

- Vit skulu fiska eini 700 tons av ráfiski um samdøgnið, um vit skulu kunna framleiða við fullari orku. Hetta svarar til umleið 120 tons av lidnari vøru.

Brandur Nólsoy sigur, at burtur úr rávøruni, fær skipið millum 16 og 23% av lidnari vøru – alt eftir, hvussu fiskurin er til støddar og dygdar.

Hann sigur, at hóast munurin á maskinorkuni umborð á Nærabergi og Atlantic Navigator ikki er tann stóri í hestakreftum, brúkti Næraberg nógva orku til at hava framleiðsluvirksemið umborð gangandi.

- Tóvmegin hjá Atlantic Navigator verður tískil munandi størri, tí minni maskinorka fer til verksmiðjuna. Tað merkir, at útlitini til størri veiði eru góð, og hetta kemur væl við, nú framleiðsluorkan umborð á nýggja skipinum verður so nógv størri, bæði til surimi og mjøl.

## Turrari dekk

Brandur sigur, at við tað, at nýggja skipið er 5 metrar breiðari enn hitt gamla, verður arbeiðsdekkið eisini nógv turrari, tá ið hálað verður.

- Næraberg royndist ógvuliga væl í sjónum, men hann er lutfalsliga smalur, og var tí vátur aftan. Breiddin á nýggja skipinum gevur nógv størri uppdrift, og tí verður tað sum dagur og nátt, tá ið hálað verður. Eg vænti ikki, at vit fara at fáa dropan inn, sum skiparin tekur til.

Hann sigur, at Atlantic Navigator gongur einar 16 míl í vanligum líkindum, men á ferðini heim úr Noregi var illveður, og tá var ferðin 13 míl.

- Skipið royndist rættiliga væl í sjónum, og vit vænta, at Atlantic Navigator fer at roynast væl, nú vit fara til fiskiskap móti háveturstíð, sigur Brandur Nólsoy.



*Brandur Nólsoy, skipari, heldur, at øll "odds" tala fyri, at raksturin við Atlantic Navigator verður betur enn við gamla Nærabergi*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Lina H. Grækarisdóttir, sjómaður:

# - Vit eru sum ein st...

**Lina H. Grækarisdóttir, sum er úr Kvívík, er ein av teimum ungu gentunum umborð á nýggja risatrolaranum, Atlantic Navigator. Hon fór fyrsta túrin við Nærabergi í summar, og hevur verið við skipinum síðan. Nú reiðaríið hevur fingið nýtt og stásiligt skip, var hon ikki í iva um at leggja til brots aftur**

ATLANTIC NAVIGATOR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Sosialurin var við, tá ið Lina fór umborð við viðførið sínum, sum hon hevði pakkað sær til hendan fyrsta túrin. Vit vóru eisini við, tá ið hon fyrstu ferð steig fótin inn í kamarið, har hon fer at "húsast" á frívaktini.

Tær eru tvær og tvær inni á einum lítlum kamari, og tær eru átta, sum síðan deila eitt fitt og hugnaligt uppihaldsrúm, ið er felagsrúm hjá teimum.

- Vit, sum eru á sama kamri, eru vanliga á hvør síni vakt, og tí ger tað ikki nakað serligt, um kømrini ikki eru so stór, sigur Lina.

Umborð á Nærabergi stóð hon við eina skermaskinu, og hon væntar, at arbeiði hjá henni verður tað sama umborð á nýggja skipinum.

- Tað er kanska eitt sindur keðiligt at standa við eina skermimaskinu eina heila vakt, men hetta er fínasta slag kortini, sigur hon.

Lina sigur, at hon og onnur umborð antin hava ein MP3-spælara ella ein sonevndan disk-man, og tónleikurin er góður at stytta sær stundir við á vaktini.

Umborð á Atlantic Navigator gongur manningin 6 tímar og hevur frí teir næstu 6.

Vit spurdu eisini Linu, hvat tey gera á frívaktini.

- Er nógvur fiskur, fara vit vanliga í koyggjuna, tá ið deksvaktin er av og hvíla okkum til næstu vakt. Men er minni at gera, sita vit og práta, spæla kort ella hyggja í sjónvarp ein part av frívaktini.

Lina hevur áður arbeitt á Fiskavirkinum í Vestmanna, og nú hon hevur verið heima og bíðað eftir nýggja skipinum, hevur hon arbeitt á vaskarínum á Landssjúkrahúsinum.

Vit spurdu eisini Linu, hvussu inntøkan hevur verið, síðan hon fór umborð á Næraberg.

- Jú, eg haldi ikki, vit skulu lata illa at. Onkran túrin, sum vardi einar 3-4 vikur, tjentu vit meira enn 30.000 krónur, og tað haldi eg, er góð inntøka.

Nú hon fór avstað aftur, var Lina í holt við at taka koyrikortið - ikki bert til persónbil, men eisini til truck og motorsúklu.

- Eg havi fingið koyrikortið til truck, men ikki til persónbil og motorsúklu. Kortini havi eg fingið teoriirnar í hús. Gongst sum ætlað, sleppi eg upp í koyring til motorsúklu, 13. januar, men eg veit ikki, um eg eri heima tá, sigur hon.

Lina sigur, at henni dámar væl, tá ið tað gongst væl at fiska og nógv er at gera á verksmiðjuni.

- Nógvur fiskur merkir, at vit tjena pening, sigur hon smílandi.

Meðan vit vóru inni á kamarinum hjá Linu, hugdu fleiri av skipswfeløgum hennara inn á gólvið. Lagið var gott, og fólk vóru spent eftir at fara fyrsta túrin við nýggja og stásiliga skipinum.

- Tað er gott samanhald umborð, og vit eru sum ein stór familja, sigur Lina H. Grækarisdóttir.



